Hiddink ynskti sær meiri tíð

Guus Hiddink hevði ynskt sær størri tíð at fyrireika seg uppá uppgávuna, áðrenn hann tók við sum høvuðsvenjari hjá Chelsea. Men hann viðgongur, at hetta var ikki møguligt. - Eg burdi havt tvær til fýra vikur fyri at síggja uppá liðið og umstøðurnar, og so kundi eg byrjað uppá arbeiðið. Men tað er eingin tíð til hetta, sigur Guus Hiddink við Sky Sports. Guus Hiddink ætlar kortini ikki at brúka tað, sum eina umbering, um Chelsea skuldi snáva í Premier League, ella í Champions League. Í toppítrótti nyttar einki at koma við umberingum.

Sleppa ikki undan doping

Ì samrøðu við norska blaðið, VG sigur norski súkkluíðkarin, Kurt Asle Arvesen: - Innan nógvar ítróttargreinar eru tað fólk, sum garantera, at ”mítt ítróttarsamband” og, at ”mítt landslið” er leyst av doping. Eg vil bara siga, at aftaná tað, sum hendi við Ivan Basso, so kann eg bara garantera fyri mær sjálvum, um eg eri dopaður ella ikki. Eingin hevur stýring á hvat hendir í teimum ymisku sovikømurunum, og í heimunum. Hvussu kann ein garantera, at fólk ikki fáast við doping? Spyr Kurt Asle Arvesen. - Man blívur ofta naivur, og trýr tað besta um sínar egnu liðfelagar. Men í dag garanteri eg bara fyri, at Kurt Asle Arvesen er leysur av doping. Staðfestir Kurt Asle Arvesen.

Neistin fer neyvan til ítróttardómstólin

– Vit hava lítlan hug at fara víðari til ítróttardómstólin, sigur formaðurin í Neistanum, Kjartan Thomasen, um kærumálið viðvíkjandi dystinum millum Neistan og VÍF fyri einum mánaði síðani, sum VÍF kærdi. Dysturin verður tí helst spældur umaftur

HONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Tá Neistin og VÍF møttust í høllini á Hálsi í Havn sunnudagin 18. januar í ár, vann Neistin 38-37. Men tað, sum mest hevur verið at hoyrt um síðani, er hálvleiksstøðan, sum á pappírinum var 21-16 til Neistan – men í eina løtu á máltalvuni var 21-17.

Eftir dystin kærdi VÍF um, at dómararnir høvdu ógildað seinasta málið í fyrra hálvleiki, sum Sámal Joensen skjeyt beint fyri hálvleik við beinleiðis tríggjarmeturkasti, tá klokkan vísti 29:59. Vístvar á, at kolldømda málið fekk avgerandi týdning fyri dystin, sum Neistin jú vann við júst einum máli.

Millum annað hevur VÍF fört fram, at tríggjarmeturkastið átti at verið tikið umaftur, tí tað ikki var tikið, tá dómaraborðið floytaði fyrra hálvleik av. – Siðvenja er, at dómararnir lata tíðina fara, áðrenn fríkastið verður tikið, og hereftir hevur spælarin trý sekund til at avgreiða fríkastið, hevur VÍF sagt.

VÍF fekk viðhald

Í úrskurði tann 1. februar gav kappingarnevndin hjá Hondbóltssambandinum VÍF viðhald og segði, at dysturin skuldi spælast av nýggjum. Nú lá bólturin hjá Neistanum, sum í roynd og veru einki hevði við málið at gera, og Neistin kærdi úrskurðin til dómsnevndina hjá Hondbóltssambandinum.

Felagið vildi hava kæruna frá VÍF afturvísta og vísti millum annað á, at mótmælið frá vestmenningum undir sjálvum dystinum ikki var noterað á dómaraseðilin, og at felagið tí metti seg at hava spælt víðari í dystinum undir skeivum fortreytum.

Fríggjadagin 20. februar kom so úrskurðurin frá dómsnevndini, sum í fleiri førum gevur Neistanum viðhald, men í sjálvari avgerð síni staðfestir avgerðina hjá kappingarnevndini, at dysturin skal spælast umaftur. Samstundis verður álagt pørtunum í felag at finna nýggjan dystardag, sum í síðsta lagi má vera 28. mars.

Enn eina ferð liggur bólturin sostatt hjá Neistanum, sum annaðhvørt kann góðtaka, at dysturin verður spældur umaftur, ella kæra avgerðina hjá dómsnevndini til Ítróttardómstólin hjá ÍSF. Verður kært, skal tað gerast áðrenn mánadagin 2. februar klokkan 13, men lítið bendir tó á, at Neistin fer víðari við málinum.

Neyvan til dómstólin

– Vit hava viðgjørt málið í nevndini, men hava lítlan hug at fara víðari til ítróttardómstólin. Tað er strævið at fáast við sovorðið, sum bæði krevur tíð og orku, sigur formaðurin í Neistanum, Kjartan Thomasen, sum eftir mong ár í ítróttararbeiði framvegis heldur lítið um, at dystir verða avgjørdir á skrivaraborðinum, heldur enn á vøllinum.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at geva VÍF viðhald í kæruni, men um tað ikki fær verið øðrvísi, so mugu vit heldur spæla handa dystinímóti vestmenningum umaftur. Eg dugi væl at skilja, at teir kenna seg snýttar fyri hetta fríkastið, men samstundis dugi eg illa at síggja, hví vit sum triðipartur í málinum skulu missa tvey vunnin stig og spæla nýggjan dyst.

Kjartan Thomasen sigur, at enn hevur nevndin í Neistanum tó ikki tikið endaliga avgerð um ikki at fara til ítróttardómstólin. – Fáa vit okkurt ítøkiligt fordømi, sum líkist hesum málinum, fara vit kanska víðari, tí vit hava jú ikki freist fyrr enn mánadagin, sigur hann.

So kann leggjast aftrat, at áðrenn mánadagin kemur sunnudagurin, tá ein av dystunum í Atlantic Airways-kappingini verður spældur í Vestmanna – millum VÍF og Neistan…

Tjaldur bjóðar av har frammi

Fyri aðru ferð í tveir dagar vunnu kvinnurnar hjá Tjaldri við 18 málum á Kyndli, og smeyg Tjaldur sær við sigrinum fram við Neistanum og undir liðina á VB – bert trý stig frá oddasessinum

HONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Dysturin í høllini á Hálsi í Havn í gjárkvøldið var tann, sum upprunaliga skuldi verið spældur 11.januar, og sum hevur vantað í á stigatalvuni – serliga hjá Tjaldri, sum nú vann hann og tí aftur av álvara er við heilt har frammi.

Støðan í oddanum er rættiliga spennandi, nú bara fýra umfør eru eftir av Sunset-kappingini, tí bæði VB og Tjaldur hava nú 22 stig, sum bara eru trý færri enn oddaliðið Stjørnan, umframt at Neistin er væl við við sínum 21 stigum. Bara tvey lið sleppa í FM-finaluna, so her kann alt henda.

Í dystinum í gjárkvøldið vóru tað fyri tað nógva tær yngru og lokalu á liðnum hjá Tjaldri, sum fingu møguleikan, og eitt nú sat Adina Petrea fyri tað nógva á bonkinum. Kortini gjørdist hon næstbesti málskjútti hjá gestunum.

Hinvegin kundi Kyndil, sum fyri aðru ferð í tveir dagar fekk ein ordans sekk frá Tjaldri, í sínum lagi gleðast um, at Randi Wardum var við aftur, hóast hon ikki í kvøld kom á máltalvuna.

Sum úrslitið og hálvleiksstøðan eisini siga, var talan stórt sæð um einvegis ferðslu, har Tjaldur longu eftir einum korteri var farið 10 mál frá Kyndli, sum – hóast 50 prosents størri úrtøku í seinna hálvleiki – ongantíð var í nánd av at sleppa ordiliga upp í part.

Við sigrinum á Kyndli í gjárkvøldið er Tjaldur aftur av álvara við í oddastríðnum
Mynd: Álvur Haraldsen

FAKTA um dystin

Kyndil-Tjaldur 15-33 (6-17)
10 min: 2-8
20 min: 4-13
30 min: 6-17
40 min: 12-25
50 min: 13-28
Málskjúttar
Kyndil: Jacklin Durhuus 5, Ása Christiansen 2, Jórun Ludvig 2, Súsanna Petersen 2, Hildur Høgenni 1, Helena á Krákusteini 1, Beinta Laursen 1, Halla Midjord 1
Tjaldur: Annika Thomsen 11, Adina Petrea 9, Alina Olaru Anghel 6, Elinbjørg Hammer 2, Benadikta Johannesen 2, Jacoba Langgaard 1, Heidi Sevdal 1, Sarah Ann B. Thomsen 1
Brotskøst: Kyndil 4, Tjaldur 2
Útvísingar: Kyndil 1
Dómarar: Hanus Kúrberg & Tummas Juul Mortensen

Rætting

Bæði mánadagin og týsdagin umrøddu vit flogbóltskvinnurnar hjá SÍ sum greipuvinnarar í ár og í fjør. Tað er ikki rætt, tí SÍ vann ikki greipuna í fjør, men »bert« føroyameistaraheitið. Í fjør var ÍF steypavinnari – enntá við sigri á SÍ… Vit biðja liðini og lesararnar fyrigeva okkum mistakið!

hil